## Klumman



**Heini í Skorini**
blaðmaður og lesandi

Góðu redaktørar!

So hoyrdu vit aftur svaduna um, at vit ikki kunnu fremja gravandi, perspektiverandi og avdúkandi journalistikk í Føroyum. Niðurstøðan er tann sama. Ov lítið av peningi. Ov lítil tíð. Og ov fá fólk. Hesaferð varð tað sagt í sambandi við, at útvarpið týsdagin varð eftirmett á fimti ára degnum.

At hetta partvís er rætt, kann ein og hvør skriva undir uppá, sum hevur starvast á eini føroyskari tíðindadeild. "Fucking masseproduktion af ligegyldigheder", sum ein danskur redaktørur tók til.

Men sjabbið um vantandi umstøður líkist eftirhondini eini umbering, sum journalistar og serliga redaktørar nýta sum skálkaskjól, tá journalistiska dygdin verður eftirmett. Ábyrgdin verður turkað yvir á onkran annan.

Tí samstundis sum politiski myndugleikin so dyggiliga svíkur, gloyma vit, at fjølmiðlaleiðslur hvønn tann einasta dag VELJA, hvussu peningurin og orkan verður umbýtt og raðfest. Eitt aktivt val, sum hvør einstakur redaktørur tekur hvønn tann einasta morgun.

Hvat kostar tað t.d. at senda heil herlið av journalistum til oyggjaleikirnar, landsdystir og festivalar? Hvat kostar tað Sosialinum í tíð og orku at skipa fyri Planet Awards? Hvat kostar tað Kringvarpinum at senda Prixið? Hvat kostar bert ein av hasum óteljandi tónleikasendingunum í útvarpinum? Hvat kosta øll eykabløðini um stevnur, festivalar, høgtíðir og drotningavitjanir?

Eingin redaktørur kann umbera seg við, at vit ikki hava pengar ella orku til borandi journalistikk. Tað er og verður ein spurningur um raðfesting, harra Øssur Winthereig, Johan Mortensen, Jan Müller, Ingi Samuelsen og kompaní.

2006 gjørdist tað árið, tá Anna Politkovskaja í Russlandi, Dick Hrant í Turkalandi og 153 aðrir skrásettir evropeiskir journalistar lótu lív fyri journalistisku avrik síni úti í stóru verð. Samstundis ganga vit føroysku tíðindafólk og nálgast í søgum, sum í morgin eru gloymdar. Fyri útlendsku martýrarnar er journalistikkur ein passión. Eitt lívsprojekt. Fyri okkum er tað eitt arbeiði. Og meðan eitt stórmál fyri og annað eftir verður avgreitt ella ikki avgreitt, VELJA miðlarnir hvønn dag at senda síni tíðindafólk út til fjant og fjas. Til "fucking ligegyldigheder"!

umborð





*- Besti dagurin hjá okkum í ár var mikudagurin í seinastu viku. Ein góður snelludagur, heldur Óli Olsen, skipari, fyri*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*

# – Vit sita og tvætla á frívaktini

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

### Næstseinasta hósdag landaði snelluskipið Havsbrún í Klaksvík. Veiðan var stívliga 30.000 pund av upsa, harav stívliga 20.000 pund vórðu fingin dagin fyri

Havsbrún er gamal bátur, bygdur úr eik og bók í Danmark sama ár, sum Føroya fólk atkvøddu fyri loysing millum Føroyar og Danmark – í 1946.

Skipið er sløk 50 tons, og útgerðarmaður er Olgar S. Andreasen í Klaksvík.

Skipari er klaksvíkingurin Óli Olsen, sum hendan dagin var fremstur á bryggjuni. So hvørt, sum kassarnir komu upp, lempaði hann ein stóran spaka við ísi niður yvir fiskarnar.

– Eg ringi onkran dagin, so vit fáa eitt lítið prát um fiskiskap, sigi eg við mannin.

Hann tóktist ikki gera stóran háva burtur úr sær, men helt fyri, at tað var í lagi.

Mikukvøldið í hesi vikuni ringdu vit so aftur, men ansaðu eftir, at tað fyrst var vorðið myrkt, so vit ikki órógvaðu, um teir lógu við kenni.

– Ja, halló. Hetta er Regin.

– Regin? Er tað ikki Óli?

– Nei, Óli verður skjótur. Vit eru júst lidnir og fara nú at fáa okkum at eta.

– Hvar eru tit?

– Vit eru norðanfyri. Hetta er fyrsti dagurin hendan túrin. Í dag hava vit fingið 13.000 pund.

– Óført, so hava tit havt ein góðan dag. Og slagið?

– Jú, tað hevur gingið væl. Slagið er, sum tað plagar, mest 3'arar.

– Fínt, eg ringi aftur, um Óli ikki fer beint í koyggjuna.

– Nei, tað fer hann ikki. Ring bara um eina løtu.

Løtan gongur, og vit royna aftur, men heldur ikki hesaferð tekur Óli telefonina.

– Hann fær sær fyrst eina sigarett. Eg haldi, hann er nervøsur, sigur maðurin og flennur.

Óli tekur telefonina.

– Jú, vit eru nøgdir í dag. Kastaðu fyrstu ferð klokkan 8.30, men allan fyrrapartin var lítið. Tað var ikki fyrr um 13-tíðina, tá vit høvdu flutt okkum longur vestur, at nakað bleiv at tosa um.

Mikukvøldið lotaði hann av landnyrðingi, men segði gott veður til dagin eftir.

– Veðrið verður helst gott í morgin, men síðan sigur hann aftur meira vind til fríggjadagin. Vit fáa væntandi bara tveir dagar í hesum umfari, sigur Óli.

At royna við snellu, nyttar einki tá tað er vorðið myrkt. Heldur einki nyttar at kasta, fyrr enn tað er ljóst aftur á morgni.

– Tú kanst fáa nakrar fiskar í skýmingini, um tú liggur í fiski, sigur hann.

Óli hevur verið við Havsbrún síðan oktober 1993.

– Eigarin, Olgar og eg, hava ført bátin, men síðan mars í fjør hevur hann ikki verið umborð vegna skaða. Tískil havi eg verið skipari alla tíðina síðan tá. Olgar hevur annars alt sítt lív verið á sjónum.

Óli tosar lítið um, hvussu hann hevur balst á havinum øll síni bestu ár, men vit vita, at hann eigur nógv ár á sjónum, eitt nú umborð á Seglhús-bátunum, eisini sum stýrimaður.

Seinni var hann eitt skifti arbeiðsformaður á virkinum hjá Joensen & Olsen.

Flestu árini við Havsbrún hava teir roynt við línu og egnt í landi. Men línuveiðan er dýr í rakstri, og tí gjørdu teir av at leggja um til snellu seint í fjør vár.

– Vit eru vanliga fýra mans umborð, hava 11 snellur. Hvør dorgin hevur seks húkar, sum vit halda vera hóskandi.

Óli vísir á, at tað er so sjáldan, at dorgin er full, men tá kennið er gott, eru vanliga 4 og 5 fiskar á hvørji dorg í senn. Teir halda tí ikki, at tað loysir seg at hava fleiri enn hesar seks húkarnar undir.

Hvussu hevur so vignast?

– Jú, eg haldi, at tað hevur verið so nøkulunda. Tað viðrar bara so illa, og tí eru so nógvir dagar, har ikki er útfarandi.

Við degnum mikudagin hevur Havsbrún fiskað umleið 100.000 pund higartil í ár – eftir roynd í einar sjey dagar tilsamans.

Vit spyrja, um frívaktin er nóg long til hvíld hesa tíðina á árinum.

– Ja, er veðrið hampiliga gott, er hetta eisini rímiliga gott lív. Skipið er gamalt, men tað koyrir so nøkulunda. Hinir menninir sova har frammi. Eg plagi at leggja meg her afturi.

Sum dagarnir gerast longri, verður eisini staðið longri við snellurnar.

Hvat hava tit at stytta tykkum stundir við, tá ið dagur er lokin?

– Ein slíkan dag sum hendan eru vit lidnir um 22-tíðina, og tá er leingi, til tað lýsir aftur.

Hvat vit gera, endurtekur Óli?

– Vit sita og práta og tvætla. Hevur nógv verið at fingið, eru menn troyttir og fara nokso skjótt í koyggjuna. Vit hava ikki fingið sjónvarp umborð enn, men tað er á veg. Hetta gleða vit okkum til, sigur Óli.

Snelluskipini drepa ongan tosk.

– Vit hava ongan gráan fisk fingið síðan einaferð í november, haldi eg.

Ymiskt er, sum várróðurin roynist, men tað skal fitt av gráum fiski vera at fáa, áðrenn eitt snelluskip sum Havsbrún leggur seg eftir at fiska tosk, nú prísurin á upsa er góður, og veiðan er nógv størri.

– Vit vænta, at veiðan hjá okkum í vár í stóran mun eisini verður upsi, sigur Óli Olsen, skipari á Havsbrún.

## Fakta

**Navn:** Havsbrún, Klaksvík
**Smíðistaður/ár:** Lundeborg/ 1946
**Tilfar:** Eik/ bók
**Maskina:** Grenaa/ 1975/ 220 HK
**Longd/ breidd:** 18,17 m /5,27 m
**BRT:** 48,69
**Útgerðarmaður:** Olgar S. Andreasen